# Vælnøgd við ungdómstúrin

**Mánamorgunin kl. 08:00 fóru 700 ung fólk umborð á Norrønu. Vælumtókti ungdómstúrurin hjá Smyril Line var á skránni. Har var nógvur tónleikur, dansur og gott lag fyri allar pengarnar**

UNGDÓMSTÚRUR
*Lív Reinert Kjeld*
*liv.reinert.kjeld@sosialurin*


*Elin Hentze í Stórustovu, fyriskipari, er ómetaliga væl nøgd við ungdómstúrin.*

Ungdómstúrurin við Norrønu hjá Smyril Line er við at verða eitt afturvendandi tiltak. Mánamorgunin fóru 700 væluppløgd ung fólk umborð at hugna sær saman, eftir at skúlin er liðugur. Tey hava havt tað stuttligt, og umborð hevur verið sum á stovugólvinum.

Á skránni var dansur, karaóki, tónleikur, kickboksing og mangt annað. Harafturat høvdu tey ungu møguleika at fáa andlitsviðgerð og fara til hárfríðkan umborð.

Elin Hentze í Stórustovu var fyriskipari, og hon letur sera væl at. –Hetta hevur gingið strálandi; yvir allar vónir og væntanir. Eg hevði ikki ímynda mær, at hetta fór at eydnast so væl, sum tað gjørdi. Eg havi prátað við skiparan, starvsfólk, vaktir og nógv av teimum ungu fólkunum umborð, og øll eru vælnøgd. Tað sæst, at øll eru við fyri at hugna sær; lagið er gott, og tað hava verið sera fáir trupulleikar. Hetta er ein fittur skari av ungum fólki. Eg vil fegin takka vaktum, manningini, teimum, sum hava undirhildið og øllum teimum ungu fólkunum fyri ein ómetaliga góðan túr, sigur ein glað Elin Hentze í Stórustovu at enda.

## Hvat heldur tú um túrin?



**Búgvi Øster, 21 ár, Signabøur. Studentur; hevur gingið í studentaskúlanum í Hoydølum í Havn.**

■ **Hvat heldur tú um túrin?**
– Jú, hetta er fínasta slag; lagið er gott, og her eru nógv kend fólk umborð, so tað er bara stuttligt. Eg eri her saman við nøkrum floksfeløgum, og vit hugna okkum saman. Tænastan hevur verið sera góð, serliga í móttøkuni. –Men tað er kanska eitt sindur synd í teimum "vanligu" ferðafólkunum…

■ **Trý orð um túrin:**
– Vátt, gott og kátt!

■ **Hvussu dámar tær tónleikin umborð?**
– Tað var løgið at hoyra 200 spæla á dekkinum klokkan átta um morgunin; stuttligt, at tónleikurin varð tveittur um alla Havnina.



**Jógvan Jacobsen, 16 ár, Havn. Liðugur við 10. flokk; hevur gingið í Eysturskúlanum í Havn.**

■ **Hvat heldur tú um túrin?**
– Hetta er ordiliga stuttligt; nógv vinfólk eru umborð, og vit hava tað ordiliga stuttligt. Veðrið hevur verið super!

■ **Hevur tú havt sjóverk?**
– Slett ikki!

■ **Trý orð um túrin:**
– Fínur, stuttligt, nógv-kend-fólk!

■ **Hvussu dámar tær tónleikin umborð?**
– Eg havi ikki lurtað so nógv, men Skunk spældu í øllum førum væl.



**Evi Hjalt, Vágur, Vígdis Enni, Tvøroyri og Inge Marie Rasmussen, Tvøroyri; allar 16 ár og lidnar við 10 flokk.**

■ **Hvat halda tit um túrin?**
– Hann er super, fínur! –Ordiliga góður!

■ **Hava tit havt sjóverk?**
– Nei, als ikki!

■ **Trý orð um túrin:**
– Festligur, suverenur, genialur!

■ **Hvussu dáma tykkum tónleikin umborð?**
– Hann er ordiliga festligur, góður at dansa eftir!

# Gott at viðurskiftini koma í rætt lag

**Yvirlýsing um yvirtøku av Vága Floghavn er almannakunngjørd 27. juni, eftir Ríkisfundin í Suðurjútlandi. Har verður nevnt at Danmarkar partur í Vága Floghavn verður latin føroyskum myndugleikum at eiga og reka. Miðjað verður eftir at yvirtaka hendan partin 1. februar 2007, sigur løgmaður.**

FLOGVØLLURIN
*Jóhan Jacobsen*
*johan@sosialurin.fo*



*Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways*

Stjóri á Atlantic Airways, Magna Arge, sigur í viðmerking til Sosialin, at tað hevði verið ein gleðiboðskapur um viðurskiftini umkring flogvøllin komu uppá pláss soleiðis at tey vóru dagførd til nútímans viðurskifti.

– Tað er uppá tíðina at hesi viðurskifti koma í rætt lag, tí umstøðurnar eru ótolandi fyri bæði ferðafólk og arbeiðsfólkið.

Finnboga Niclasen, stjóri á Vága Floghavn. Er samdur í, at umstøðurnar fyri bæði ferðafólk og arbeiðsfólk eru ótolandi. Har gerst ofta sera trongt at arbeiða og hjá ferðafólki at koma til og av flogvøllinum, sigur Finnbogi Niclasen.

Hann er sera væl nøgdur við útviklingina. Nógv hevur verið tosað um hetta málið, men nú kemur vónandi gongd í hetta av álvara. – Nógvar frágreiðingar eru komnar herfrá og ein arbeiðsbólkur hevur arbeitt við málinum og hevur lagt hetta fyri løgmanni. Og síðan er avger m.a. tikin við støði hesum arbeiði. Finnbogi er sera væl nøgdur við hesa avger, sum er at lesa í eini felags yvirlýsing frá løgmanni og forsætisráðharranum. Hetta síggi eg sum eina stóra avger og yvirtøkan er eisini í lagi. Tað hevur riggað væl við Statens Luftsfartsvæsen, men eigaraskiftið er í ordan.

# Tað kókaði hjá 200 í Roskilde

**Ein av okkara heimildarmonnum hevur júst verið á konsert hjá 200 á Roskilde Festival. "Tað var totalt feitt", var hansara niðurstøða.**

TÓNLEIKUR
*Rókur Jákupsson Jakobsen*
*rokur@sosialurin.fo*


*Uni Árting, trummusláari í 200*

200 framførdu í einum stórum tjaldi. Sagt verður, at umstøðurnar vóru sera góðar – ljóðgóðskan var í topp, og umstøðurnar annars vóru á góðari leið. Fleiri 1000 fólk mundi vera til staðar, og av teimum mundi eini 200 (stuttligt nokk) vera føroyingar.

Áðrenn 200 komu á pallin, rungaði tjóðsangurin tvær ferðir í tjaldinum. Hetta man hava verið nakað serligt fyri tey sum ikki eru føroyingar. Men so komu 200 uppá pallin, og teir leveraðu eina framúr góða konsert, verður sagt. Tað var sera gott lív í, hóast at heimildarmaður okkara sigur, at tað vóru nøkur, sum ikki skilti hvat ið fór fram í tjaldinum.

Hæddarpunktið á konsertini var "Muscleman Blað". Annars spældu 200 tilfar frá teimum báðum fyrstu útgávunum, og eisini okkurt av tí komandi Graceland. 200 vóru enntá róptir upp aftur, og tá spældu teir 2 eykaløg. Hetta má sigast at vera sera flott klára av okkara punkarum.

Sambært okkara keldum, fingu 200 stak góð ummæli í festivalavísini. Vit royna at fáa hendur á ummælinum til í morgin.